

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Køksfólk til Býlingshúsið í Maritugøtu

Søkt verður eftir einum køksfólki at arbeiða 10 tímar um vikuna at byrja 1. mai 2008. Møguleiki verður eisini at vera avloysari á stovninum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Býlingshúsið í Maritugøtu, Maritagøta 50, 100 Tórshavn í seinasta lagi mánadagin 28. apríl 2008.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingu-Mariu Amandusardóttir, stovnsleiðara ella Nancy Hentze telefon 30 24 00 / 27 29 29.

www.123hjemmeside.dk/byl-maritugota

## Hjálparfólk til Býlingshúsið undir Brúnni

Søkt verður eftir einum hjálparfólki, at arbeiða 35 tímar um vikuna í barnagarði at byrja skjótast til ber. Starvið er eitt tíðaravmarkað starv frá 1. mai 2008 til 31. desember 2008.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Turið Horn, leiðara, telefon 31 91 80.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9b, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. apríl 2008.

## Pedagogur til Dagstovnin við Botnánna

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 35 tímar um vikuna í barnagarðinum at byrja 19. mai 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Emly Djurhuus, stovnsleiðara, telefon 22 13 23.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera Dagstovninum við Botnánna, Botnavegur, 410 Kollafjørður í hendi seinast mánadagin 5. mai 2008.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

## Umlættingarheimið Dáin

– Summarfrítíðaravloysarar til umlættingarheimið Dáin, Klaksvík

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til heimið í juni, juli og august 2008. Vit søkja avloysarar fyri pedagogar og hjálparar.

Dáin er eitt umlættingarheim fyri menningartarnað børn og vaksin. Heimið hevur 2 deildir, døgn- og dagumlætting. Arbeitt verður í skiftandi vaktum, dag-, kvøld-, og náttarvaktir.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til leiðara ella varaleiðara á tlf. 457185, gerandisdagar millum kl.10.00 og 11.00.

Umsókn, saman við møguligum prógvi og viðmælum, verður at senda til:

**Umlættingarheimið Dáin**
Mýrivegur 11
700 Klaksvík
Stílað: Leiðarin

**Umsóknarfreist 16 mai 2008.**

## TRIV SP/F

# Starvsfólk til TRIV

Til verkstað okkara sóknast vit eftir starvsfólki til umvæling av traktorum, sláimaskinum og øðrum landbúnaðarmaskinum.

Tað er sjálvandi ein fyrimunur, um tú ert t.d. landbrúksmekanikari, maskinsmiðjur e.l., men hevur tú fingið tín lærdóm av egnum royndum, so ert tú vælkomin at søkja, tí vit vilja fyrst og fremst hava fólk við røttu evnunum.

Eru spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum ella send okkum nøkur orð um teg sjálvan.

Triv

Heygsvegur 30
P.O. Boks 197
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 69 10
Fax 31 81 19

